

*Bæði Felagið Nótaskip og Føroya Fiskimannafelag halda, at sáttmálin fyri nótaskip, sum eru yvir 1500 tons og kunnu frysta, kundi verið greiðari. Henda spurning fara feløgini nú at viðgera*

# Vilja hava greiðari orðingar í sáttmála

**Felagið Nótaskip vil hava greiðari orðingar í sáttmálanum fyri nótaskip yvir 1500 tons sum kunnu frysta. Sjálvur kundi formaðurin í Fiskimannafelagnum eisini hugsað sær, at júst hesin sáttmáli var greiðari, so gjøgnumskygni í honum eisini verður betri**

SAMRÁÐINGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú sáttmálasamreiðingar skulu verða millum fiskimenn og reiðarar, hevur felagið Nótaskip nøkur ynski í sáttmálanum fyri nótaskip yvir 1500 tons sum kunnu frysta. Talan er í hesum førinum um skipini Norðborg, sum er framleiðsluskip og Næraberg, sum kann heilfrysta.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, væntar, at felagið fær uppskot um ynskini hjá Nótaskipum í dag, og ætlandi fer fiskimannafelagið á stjórnarfundi, sum væntandi verður fríggjadagin, at viðgera hesi ynski.

### Ógreiður eru

- Vit hava ikki skilt, at Nótaskip vilja trýsta okkara limir til nakað sum helst, sigur Jan Højgaard, sum kortini ásannar, at tað eru ymiskar óhepnar orðingar í hesum sáttmála, sum felagið er sinnað at tosa við Nótaskip um.

Sjálvur kundi formaðurin í Fiskimannafelagnum hinvegin hugsað sær, at júst hesin sáttmáli - sáttmálin fyri nótaskip yvir 1500 tons sum kunnu frysta - var greiðari, so gjøgnumskygni í honum eisini verður betri.

- Eg havi ikki skilt, at Nótaskip hava nøkur krøv, og vit hava heldur eingin krøv, men vilja fegnir tosa um viðurskifti í hesum sáttmála, sum kunnu gera hann greiðari.

Jan Højgaard sigur, at tað kemur ikki uppá tal at gera umstøðurnar hjá nótamonnum verri, enn tær eru í dag.

### Stjórnarfundur

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur eisini, at felagið á stjórnarfundi fríggjadagin eisini fer at tosa um tær samráðingar, sum liggja fyri framman millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið.

- Enn er stjórnarfundurin ikki endaliga ásettur, men ætlanin er at halda fundin fríggjadagin, sigur Jan Højgaard.

# LISA tvey nýggj limafeløg

Á umboðsráðsfundi tann 10/11-2009 vóru tvey feløg tikin upp sum limir í LISA (Listafólkasambnd Føroya). Feløgini eru: Myndlistasambandið og Einleikarafelag Føroya. Myndlistafelagið, er eitt felag fyri skapandi myndlistafólk, og hevur til endamáls at proffessionalisera myndlistina við menning av útbúgving, arbeiðsumstøðum og umsiting. Felagið skipar fyri Heystframsýningini. Einleikarafelagið er eitt áhugafelag fyri virknar klassiskar yrkistónleikarar. Endamálið er at stimbra tónlistarumhvørvið.

Í LISA eru nú 11 feløg:
Arkitektafelag Føroya
Einleikarafelag Føroya
Føroya Tónleikarafelag
Føroysk Miðlafólk
Føroysk Myndlistafólk
Føroysk Tónaskøld
Kórsamband Føroya
Leikarafelag Føroya
Myndlistafelagið
Rithøvundafelag Føroya
Yrkisfotografar í Føroyum

# Hvussu kunnu staðanøvn í øðrum londum skrivast á føroyskum?

**Fundur í Miðlahúsinum - fyrilestur og kjak um føroyskt mál í nýggjum høpi**

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 14. november kl. 15 verður fundur í Miðlahúsinum, har Rolf Guttesen, fyrrverandi Associate Professor á Geografisk Institut í Kjøpinhavn, heldur fyrilestur um evni: "Hvussu skulu staðanøvn (toponymir) í øðrum londum skrivast í føroyskum tekstum?"

Eyvind Weyhe, leiðari á føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, kemur stutt at greiða frá hvat mann ger í ST (Sameindu Tjóða) høpi, fyri at standardisera almenn geografisk nøvn.

Sjúrður Skaale, løgtingslimur, fer at greiða frá gongdini í ABC'málinum, og André Niclasen hugleiðir um, hvussu vit kunnu fáa eitt breitt umboðandi málráð.

Lagt verður upp til fyrilestur og kjak og øll eru vælkomin.

Fyriskipari er Málfelagið v/ André Niclasen, Dan R. Petersen og Regin Eikhólm



*Rolf Guttesen fer at tosa um, hvussu staðanøvn í øðrum londum skulu skrivast í føroyskum tekstum*